# BÓKASÍÐAN

bøkur, bøkur, bøkur…



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

## Kúgandi góðvild

Ida Jessen, *Det første jeg tænker på*
Gyldendal, 2006

Tað gongur við rúkandi ferð hjá danska høvundanum Ida Jessen í løtuni. Seinast vit hoyrdu frá henni var í heyst, tá hon gav út nógv róstu skaldsøguna ABC, har høvundurin við óhugnaligari innliving lýsir, hvussu ein kvinna spakuliga og besnissað oyðileggur lívið hjá manninum.

Nú ger Ida Jessen longu aftur vart við seg. Hesuferð við skaldsøguni *Det første jeg tænker på*, har tað enn einaferð er listinlærda kvinnan, sum er miðdepilin.

Presturin Annette hevur í áravís ofrað seg fyri sína famlju og síni sóknarbørn. Men tá sonur hennara doyr í eini ferðsluvanlukku, har bilførarin rýmir av staðnum, og Annette sjálv fær brúk fyri hjálp, halda fólk seg burtur. Hennara ørkymlaða roynd at finna seka bilføraran, so hon kann fyrigeva honum, verður skjótt til kvalandi sjálvgóðsku. Sum frá líður, verður frásøgnin ein avdúking av ranguni á uppofrandi atburðinum hjá Annette, sum vísir seg at botna í sjálvsøkni, maktgirnd og eini tráan at stýra øðrum menniskjum. Skaldsøgan verður soleiðis ein rannsakan av góðvildini, serliga tí kúgandi góðvildini, sum allatíðina lúrir undir tigandi sálarliga spælinum millum menniskju.

Eins og í flestu bókunum hjá Ida Jessen liggur spenningurin í tí ósagda og burturtagda, sum lesarin allatíðina hevur varhuga av, men sum ongantíð verður útgreinað beinleiðis.

*Det første jeg tænker på* kemur út 10. januar.



*Listinlærda kvinnan er aftur miðdepilin í nýggjastu skaldsøguni hjá Ida Jessen*

# Bøkurnar og eg



Uni Arge var ikki sørt bergtikin av bókini *Det generøse menneske* eftir Tor Nørretranders, sum heldur uppá, at alt, sum vit gera, gera vit fyri at tekkjast hinum kyninum …

**Uni Arge, journalistur**

*Hvørja bók lesur tú í løtuni?*
- Eg havi ovmikið at lesa. Eg keypti mær bókina hjá Ólavi Rasmussen um Søren Kierkegaard fyri jól og las hana á jólum. Frálík bók. Hann viðger djúpar spurningar á ein lættan hátt. Í jólagávu ynskti eg mær *"Ó"* hjá Carl Jóhan Jensen og *Glansbílætasamlararnir* hjá Jóanes Nielsen. Eg lesi *Ó* nú. So herji eg á Jóanes aftaná. Leingi havi eg eisini lisið burtur úr endurminningunum hjá Bill Clinton.

*Er tað onkur bók, tú minnist serliga væl?*
- Eg minnist best, tá eg í 2004 skrivaði mína egnu bók, *Komin er nú onnur øld*. Eg lærdi tá, at treiskni og hart arbeiði krevjast fyri at fáa eina bók frá hondini. Tað finst ongin lættur vegur uttanum. Annars dámdi mær stak væl *Det generøse menneske* hjá Tor Nørretranders. Alt, sum vit gera, gera vit fyri at tekkjast hinum kyninum, sigur hann. Vísa vit, at vit duga tað trupla, fáa vit maka. Ógvuliga undirhaldandi bók.

*Hvør var tín fyrsta lesiuppliving?*
- Tað mundi vera, tá vit í 1. flokki lósu "Ása sá á. Sá Ása á." Tað ljóðaði heilt gandakent. Sum ein lítil yrking. Tað er løgið at hugsa sær, at hesi fáu orðini vóru byrjanin til lesiførleikan í dag. Skúlin er mangan tungur at koma ígjøgnum, men tøkk fái allir tolnir lærarar fyri tann lærdóm, teir oysa niður í børnini. Alt, vit ikki duga, er trupult. Tá vit hava lært tað, er tað eitt spæl.

*Hvørja bók vildi tú ynskt, at tú hevði lisið?*
- Eg kundi hugsað mær at granska Bíbliuna út í æsir. Hon er tann bókin, sum hevur største týdningin fyri okkara mentan og atferð, og tí kemst ikki uttan um hana. Í ongari bók er so nógvur lívsvísdómur savnaður sum í Bíbliuni. Tó skilji eg ikki, at tey, sum siga seg dyrka kærleiksboðskapin í Bíbliuni mest, ofta vísa minst tolsemi. Tað er ein skemtilig andsøgn.

*Hvat fær teg at velja tær bøkur, tú lesur?*
- Tráanin eftir at fáa innlit. Eg eri forvitin eftir at skilja, hvussu menniskju eru, og hvussu verðin hongur saman. Kanska ein skaldsøga kann geva tær opinberingina. Kanska ein ævisøga ger tað. Ella kanska alt tilsamans, sum vit lesa, ger okkum klókari. Eg velji at trúgva, at so er, og tí lesi eg umframt bøkur alt frá bløðum til vørulýsingar á shampoodunkum.

Rætting:

## Sonja vann kappingina

Í grein herfyri um útgávur hjá Bókadeildini var ymiskt komið skeivt fyri.

Sonja Sørensen gjørdist ikki nr. 3 í ungdómsbókakappingini, sum Bókadeildin skipaði fyri í 1989, men vann hana við bókini *Suphaya*.

Í greinini varð eisini sagt, at forlagið er í ferð við at geva trý nýggj ungdómsbókahandrit út. Tað er rætt, at tríggjar nýggjar upprunaføroyskar bøkur eru á veg, men ongin av teimum er ein ungdómsbók.

Vit biðja orsaka mistakið.

Viðmæli:

## Er Bíblian lygn?

*Jákup Mørk*

"Skjótast seljandi skaldsøgan til vaksin nakrantíð!"

Tað er ikki hissini skoðsmál, metseljarin hjá Dan Brown, *The Da Vinci Code*, hevur fingið. Lat tað tó eisini verða sagt alt fyri eitt, at sum so er hetta skoðsmálið eisini vælgrundað. Bókin er eitt perludømi um eina - nær sagt - bíliga spenningsroman, uttan at hetta tó skal misskiljast.

Plottið í søguni er í sær sjálvum sera einfalt. Ein professari í list verður funnin myrdur á Louvre-savninum í París. Umstøðurnar kring drápið eru pent sagt merkisverdar, men sum frálíður gerst greitt, hví so er. Á deyðastráð hevur myrdi professarin givið nøkur tekin um ein av størstu savnsgripunum í heiminum. Umvegis listaverk hjá Da Vinci letur hann vita, hvar ella hvat heilagi kalikkurin í veruleikanum er.

Og so gongur tað skjótt fyri seg. Tær 456 síðurnar í bókini snara allar um næstu 24 tímarnar. 24 action-pakkaðar tímar, har good vs. evil, hetjur og illgerðarmenn hvørt um annað jagstra heilaga dýrgripin.

Tað serliga við bókini er tó tann mest sum geniali frásøguhátturin. Partvíst er søgugongdin somikið kompakt, at lesarin onga róliga løtu fær í hesum neti av væl hugsaðum krimi-gátum, sum støðugt bjóða gráu kyknunum av. At bókin so á vegnum setir nøkur stór spurnartekin við grundarlagið undir kristintrúgv okkara, ger hana ikki minni áhugaverða. At seta spurnartekin við nakað so grundleggjandi, vil altíð vera sera vandamikið hjá einum rithøvunda. Eisini hóast søgan í besta amerikanska stíli hevur ein endamoral, har virðið á kristintrúnni verður revaluerað.

At Dan Brown er sloppin væl frá hesi avbjóðing, er tó eingin ivi um. Nakað sum fremsta plássið at bestseljaralistanum yvir bestseljarar eisini ber boð um.




Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…
Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent
FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo